

*Roc Amadour riggaði av leygardagin*

*Mynd: Johannes Andreasen*

# Roc Amadour riggar av

**»Rokkurin«, sum hann vanliga hevur verið nevndur millum manna, riggaði leygardagin av, eftir sín síðsta túr, ið var rokturur. Skipið fer nú úr flotanum og Sunbeam kemur ístaðin**

SKIP
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Felagið V-Invest í Vági hevur átt Roc Amadour síðani 2006. Har verður sagt, at skipið er gamalt og tí er tað nú á sølulista, tí felagið vil fegið av við skipið. Ætlanin var at fáa Sunbeam inn fyri Sancy, men hetta eydnaðist ikki, men nú er so loysn funnin, har »Rokkurin« fer úr og Sunbeam kemur inn í flotan. Sunbeam hevur annars ligið svínabundin við bryggju í Vági, síðani skipið kom til landið fyri ári síðani.

Roc Amadour er bygdur í Fraklandi í 1973 og kom til Føroya í 1981. Tá hevði skipið heimstað á Strondum, og frá 1994 til 2001 hevði tað heimstað í Fuglafirði og nevndist Boðasteinur. Felagið Moyggjartúgva í Vági keypti skipið í 2001 og fekk skipið aftur navnið Roc Amadour.

Roc Amadour gjørdi góðan túr á síðsta túrinum. Skipið kom á Vág leygardagin við 85 tonsum, sum ætlanin var landað á Tvøroyri í dag, mánadag, og virðið á lastini er á leið 1,5 milliónir krónur.

# Meldurhvirla í Sumba

**Eitt heldur sjáldsamt náttúrufyribrigdi sást í Sumba sunnudagin. Útfyri Sumbiarhólmi sást ein meldurródn, ella meldurhvirla, og hon kom inn móti bygdini og fór niðan ígjøgnum Stórá**

ÓDN
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



*Meldurhvirla í Sumba*

*Mynd; E.L.L.*

Um fimm tíðina sunnudagin varnaðust fólk í Sumba, at ein meldurhvirla nærkaðist Sumbiarhólmi. Hon var sermerkt, tí eisini sjálvur hvirilin sást í luftini. Hvirilin kom inn móti bygdini, og komin í mølina við Stórá, fann meldurhvirlan lægsta stað, og fylgdi síðani Stórá niðaneftir.

Ongin skaði tykist vera hendur av meldurhvirluni, tó onkur sigur seg hava sæð eina stikrullu vera tikna við meldrinum, men uppi við Kvíggjá merktist hvirlan inni í húsunum.

Ein kvinna í áttatiárunum gjørdi vart við seg fyri at vita, hvat var hent. Hon hevði ongantíð upplivað slíkt áður.

Yvirhøvur eru slíkar meldurhvirlur slíkt fyribrygdi, ið fólk óivað einamest kenna frá amerikonskum filmum, men hesaferð hendi tað so í Sumba, sum sæst á myndunum, sum kvikir sumbingar tóku í dag.

